Skúlastýrisfundur 01.10.2024

Møtt vóru: Jónleyg Eyðunsson, Rakul Borg Brattaberg, Durita Poulsen, Birgir Jørgensen, Hjørdis Simonsen og skrivarin John Henrik Holm

Skrá:

1. Síðan seinast
2. Skúlasosialráðgevi ?
3. Skúlastýrisval
    1. Valnevnd skal setast
4. Námsætlanir vm.
5. Kunning av ymiskum slag
6. Ymiskt

Ad. 1

Gigni hevur sett ein skúlaheilsufrøðing at starvast í Vágs- & Tvøroyrar skúla. Heilsufrøðingurin er sett 32 tímar um mánaðin, hesir tímar skulu deildast millum skúlarnar báðar. Tað hevur verið ein afturvendandi trupulleiki at fáa starvið sum heilsufrøðing sett á skúlunum í Vági og á Tvøroyri. Vit gleðast um at hava fingið nakrar tímar til hetta týðandi starv, men er samstundis hørm um at vit ikki kunnu fáa ein heilsufrøðing, sum starvast normeraðu tíðina á skúlunum báðum.

Ad. 2

Staðseting okkara í Suðuroynni er oftani ein avbjóðing tá tað kemur til hjálp til næmingar/heim, sum hava tað trupult. Eingin sálarfrøðingur er í oynni. Vit hava júst í undanfarna málið um skúlaheilsufrøðing staðfest, at skúlin í fleiri ár ikki hevur havt nakran heilsufrøðing. Tá støður uppstanda er støðan oftani, at vit standa einsamøll við avbjóðingum, sum okkum tørvar fakliga hjálp til.

Tí hava tankar okkara verið at seta inn við einum fyribyrgjandi átakið, so vit í minst møguligan mun hava/fáa tørv á sálarfrøðisligari ella sosialari hjálp. Skúlin hevur verið í samskifti við sosialráðgeva um møguleikan at arbeiða tættari at skúlanum. Somuleiðis hevur skúlin leita sær kunning um hvørjar uppgávur ein sosialráðgevi kann hava í skúlahøpi.

Møguligar arbeiðsuppgávur hjá einum sosialráðgeva í einum skúla:

- Samstarv og ítøkilig átøk fyri at tryggja best møguligan trivna hjá børnum og ungum ið hava trupulleikar við t.d.:
    - - Innvirkin- og útvirkin atferð
    - - Happing
    - - Hjúnaskilna hjá foreldrum
    - - Skúlaaftran
    - - Væntandi stuðul heimani frá
    - - Angist
    - - Óróð og væntandi trivnaður í bólkum

- Samstarv um og ítøkilig átøk í arbeiðinum við foreldrum:
    - - Netverksfundir og uppfylgingar
    - - Avtalur við foreldrum um ítøkilig átøk
    - - Ráð og vegleiðing til foreldur

- Bindilið til og millum:
    - - Heim/netverk
    - - Barnavernd
    - - Gigni
    - - Heilsufrøðing
    - - Aðrar stovnar og fakfólk
- Vegleiðing til starvsfólk á skúlanum:
    - - Sparring um hvørji ítøkilig átøk kunnu takast, og hvussu og hvør ger hvat.
    - - Sparring um, hvussu ein kann vera í teimum truplu arbeiðsstøðunum.

Skúlastýrið tekur undir við ætlanini og heldur hetta vera eitt sera gott hugskot. Skúlastjórin fær til uppgávu at kanna møguleikar hesum viðvíkjandi og kanna hvussu ein skúlasosialráðgevi skal fungera (arbeiðsøki/arbeiðsábyrgd). Hvør skal gjalda eina tílíka royndarverkætlan. Kanna møguleikan fyri at fáa Porkeris- & Sumbiar skúla við.

Ad. 3

Skúlastýrisval verður 12 nov. 2024

Skúlastýrið hevur eftirlit við virksemi skúlans og hevur m.a. hesar uppgávur:

1. Ásetur meginreglurnar um virksemi skúlans m.a.:
    • samarbeiðið millum skúla og heim
    • næmingafráverur
    • fráboðan til heimini um úrtøku næminganna í undirvísingini
    • foreldrafundir, setursskúla og onnur felags tiltøk

2. Ger við støði í ásettum reglum atferðarreglur skúlans og umsjónina við næmingunum í skúlatíðini.

3. Ummælir árligu fíggjarætlanina fyri skúlan og leggur tey mál fyri kommunustýrið til góðkenningar, ið bera fleiri útreiðslur við sær, enn ásett er í fíggjarætlanini.

4. Viðger saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygging og umbygging í verandi skúlum

5.Viðger saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað í kommununi og broytingar í galdandi skúlabygnaði

6. Góðkennir eftir tilmæli frá námsfrøðiliga ráðnum teir undirvísingarmiðlar, sum skúlin skal brúka

Í kunngerð §4 frá 6. Okt. 2008 um val av skúlastýri stendur:

*Í sambandi við val til skúlastýrið setur kommunustýrið eina valnevnd til hvønn sjálvstøðugan skúla í kommununi. Í valnevndini eru eitt umboð fyri kommunustýrið, eitt umboð valt av fráfarandi skúlastýri og skúlaleiðarin, sum er formaður. Formaðurin kallar inn til fyrsta fundin.*

Skúlastýrið velur Duritu Poulsen sum umboð í valnevndina fyri skúlastýrið. John Henrik fær til uppgávu at spyrja Levi Mørk um hann hevur áhuga í at vera við í valnevndini til komandi skúlastýrisval. Levi bær seg undan og hevur Anna Brattaberg Samuelsen, býðráðslimur at verða við í valnevndini.

So valnevndin til komandi skúlastýrisval er:

John Henrik Holm, skúlastjóri og formaður í Valnevndini
Durita Poulsen forkvinna í skúlastýrinum
Anna Brattaberg Samuelsen, kommunustýrisumboð

Ad. 4
Skúlastjórin vísir á heimasíðuna við námsætlanum fyri fólkaskúlan og tekur fram dømir um hvussu námsætlanir eru gjørdar í Vágs Skúla. Tað verður gjørd ein námsætlan/lesiætlan fyri hvørja lærugrein sær á hvørjum flokstigi.

Hereftir leggur skúlastjórin fram landsroyndar úrslitini fyri 2023 & 2024. Í framløguni verða úrslit skúlans løgd fram og hvussu skúlin "klárar" seg í mun til landsmiðal.

Ad. 5

Skúlastjórin vísti myndir av einum nýggjum skúla í Finlandi og hvussu tey høvdu valt møblar.











Á hesum skúla var undirvísing skipa eitt sindur ørvísi enn vanliga “talvu” undirvísingin.

Durita Poulsen

Rakul Borg Brattaberg

Birgir Jørgensen

Jonleyg Eyðunsson

Levi Mørk (lisið)

Hjørdis R. Simonsen